# Rúsan skal verjast

Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum, heldur ikki, at tað rætt, at Rúsan húsast undir sama taki, sum aðrir vanligir handlar.

Sostatt er hann ikki samdur við tí stóra meiriluta, sum í okkara nýggju veljarakanning halda, at tað skal bera til hjá Rúsuni at hava handil, har eisini aðrir handlar eru.

– Eg haldi, at vit eiga at verja Rúsuna sum stovn, og tí eigur hon at vera fyri seg sjálva, sigur Pál Weihe.

– Tað er ikki rætt, at Rúsan lænir sína atdráttarmegi til aðrar handlar. Tá ið Rúsan nú kortini ger tað, er skjótt, at eisini aðrir handlar eisini kunnu krevja at fáa ágóðan av teirri atdráttarmegi, sum Rúsan hevur.

Tí heldur formaðurin í Fólkaheilsuráðnum, at Rúsan skal vera leys av øðrum handlum.

– Vit eiga at tryggja, at tað er so lítið at finnast at hjá Rúsuni sum gjørligt, leggur hann afturat.

Men so heldur hann eisini, at táið vit fara at keypa rúsdrekka, skal tað vera eitt tilvitað val.

– Rúsdrekka skal ikki vera impulskeyp, sum vit brádliga gera, tá ið vit fara í aðrar handlar at keypa okkurt heilt annað, sigur hann.

Samstundis heldur hann, at vit skulu hava eina sterka Rúsu, sum tryggjar okkum eitt stórt og gott úrval, so at eisini tey, ið veruliga virðismeta gott vín, gott øl og gott rúsdrekka, eisini kunnu fáa sítt í Rúsuni.

Tað eru mong, sum halda, at fáa vit fría rúsdrekkasølu, fer úrvalið at versna munandi, tí ongin privatur handil fer at hava serstakar vørur á goymslu.

# Stórur meiriluti fyri fríari rúsdrekkasølu í Føroyum

**VELJARAKANNING** Ein spillfesk veljarakanning vísir, at føroyingar vilja hava rúsdrekka í teir vanligu handlarnar

Áki Bertholdsen

Stendur tað til vanliga føroyingin, skal Rúsan avtakast og ístaðin skulu vit hava fría rúsdrekkasølu í Føroyum.

Tað vísir ein nýggj veljarakanning, sum Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning hevur gjørt fyri Sosialin.

Hendan nýggja veljarakanningin vísir enntá, at tað er trivaligur meiriluti í fólkinum fyri fríari rúsdrekkasølu.

Kanningin vísir nevniliga, at 59,9% av føroyingum vilja hava fría rúsdrekkasølu.

Harafturat eru 11,6% av fólkinum, sum onga avgjørda meining hava um tað, tí tey siga, at tey eru hvørki samd ella ósamd.

Sostatt eru tað bara 28,5% av fólkinum, sum beinleiðis siga, at tey eru ímóti eini fríari rúsdrekkasølu.

## Ongin trupulleiki

Herfyri var nógv kjak í Løgtinginum um Rúsan skuldi sleppa at halda til í eini handilsmiðstøð og um hon kundi hava somu úthurð sum aðrir handlar í eini handilsmiðstøðini.

Í veruleikanum brúktu tinglimir so nógvar ferðir meiri tíð upp á at kjakast um inngongdina í Rúsuni, enn teir brúktu um at avgreiða landsins týdningarmestu lóg, figgjarlógina, eftir at figgjarnevndin var liðug við sítt arbeiðið.

Tað var Miðflokkurin, sum vildi hava Løgtingið at samtykkja, at Rúsan skuldi ikki sleppa at hava handil, har inngongd eisini er til aðrar handlar.

Nettupp hetta um hølisviðurskiftini hjá Rúsuni var eisini eitt, sum spurt varð um í nýggju veljarakanningini.

Og her er ongin slingur í valsinum.

Heili 67,2% taka undir við, at Rúsan kann saktans verða saman við øðrum handlum, samstundis sum 12% hava onga avgjørda meining um hetta.

Sostatt eru bara 20,8% av fólkinum, sum krevja, at Rúsan skal hava sína egnu inngongd.

*aki@sosialurin.fo*




*Hendan talvan vísir, hvussu stór undirtøkan er í føroyska fólkinum fyri fríari rúsdrekkasølu í Føroyum*




*Hendan talvan vísir, hvat fólk halda um ætlanina at forða fyri, at Rúsan er saman við øðrum handlum*

## » Tað er trivaligur meiriluti fyri fríari rúsdrekkasølu

# 7 LITRAR

Formaðurin í Fólkaheilsuráðnum sigur, at vit eiga undir ongum umstøðum at seta tiltøk í verk, sum økja nýtsluna. Tí er hann ímóti fríari sølu.

– Skulu vit hava greiðar linjur, skulu vit heldur seta tiltøk í verk, sum minka nýtsluna.

Við hesum heldur hann ikki, at tað er neyðugt at herða sjálva lógina, tí hann tekur avgjørt undir við teirri skipan, vit hava nú við eini einkarsølu.

– Tá ið rúsdrekkalógin varð broytt, og vit fingu Rúsuna í 1992, var endamálið, at nýtslan skuldi haldast undir sjey litar av alkoholi fyri hvørt fólki.

- Tað hava vit megnað, so vit eru á heilt góðari leið við teirri skipan, vit hava í dag.

Hann staðfestir eisini, at skal nýtslan regulerast, hava vit eitt sera effektivt amboð at stýra nýtsluni.

Og tað er prísurin!

Fyri nøkrum døgum síðani fortaldi Sosialurin, at sølan hjá Rúsuni er minkað næstan 25% seinastu tíðina.

Stjórin í Rúsuni heldur, at Rúsan er besta barometrið fyri, hvussu tíðirnar eru í samfelagnum og beinanvegin Eik gav skarvin yvir og Fiskavirking fór á húsagang, hildu fólk uppat at keypa rúsdrekka.

- Hetta sigur eitt sindur um, hvussu viðbrekin rúsdrekkasølan er mótvegis prísbroytingum.

Hann staðfestir tí, at skal nýtslan minkast, er lættasti mátin at seta prísin upp.

Kortini er hann nøgdur við støðuna sum hon er, tí nýtslan er undir teir sjey litrarnar fyri hvørt fólki, sum vit settu okkum sum hámark, tá ið Rúsan varð sett á stovn.